LM-066/2025

**Dan Michael Knudsen**

**Fra:** Uffe Baerentsen <uffekb@gmail.com>
**Sendt:** fríggjadagur, 14. november 2025 14:06
**Til:** Journalin hjá LMS
**Emne:** Hoyrings skriv viðv. Suðuroyartunlinum.

Hoyringsskriv viðv. Farleið til Suðuroyar.

Loyvið mær við hesum at koma við einum hoyringsskrivi og vegleiðing viðv. verandi ætlan av Suðuroyartunnli - sum
er í fer við at verða framdur heilt skeivt - soleiðis sum løgmaður og alt løgtingið er í fer við at fremja við leið 1b ella hvat
hon eitur - tvs. tann á papírinum stytsta og nógv tann farligasta sum fremjast kann.

Grundgevingin er hendan:
Á fundinum í Finsen týskvøldið tann 11. november 2025, legði stjórin Teitur Samuelsen fyri við at siga, at tað týdningarmesta
er váðin - fyri síðan at leggja fram ein tunnil, har váðin er størstur, tvs. at tað er tað longsta holið út í eitt, við bara einum
luftholið í hvørjum enda - og tað gamaní um man stingur eitt hol upp til Skúvoyar á vegnum. Tvs. at man fær eina øgiliga langa innisperraða leið - í mun til hvat sømir seg at gera nú til tey næstu ættarliðini at nýta.

Ofta hoyrir man løgmann og onnur fólkavald taka til ymiskt gott í Føroyum, sum framsíggin fólk gjørdu fyri t.d. 100 árum síðani -
men ivasamt verður um tey, sum fara at liva um eini 100 ár, fara at breggja sær av at klókir politikarar framdu eina skilagóða farleið
til Suðuroyar, um so lítið verður hugt fram í tíðina við nú at gera holið, sum semja sær út at vera um nú.

Nógv tað skilabesta er at gera eina leið sum fer niður á Sandi, uppaftur í Skúvoy og niður aftur har, so uppaftur í Stóru Dímun og
niður aftur har, og so uppaftur í Suðuroy.

Tá byggir man landið út so nógv sum man kan - landi hjá okkum er ov lítið frammanundan - og samstundis ger man tað leið
sum verður nógv tryggast, við fleiri stuttum teinum, har váðin er nógv minstur fyri alla leiðina sum hon er.

Veit at tað kostar heldur meira - 1 milliard í meirkostnaði var nevnd á fundinum týskvøldið - men tað er "bara" 10 milliónir krónur
um árið í 100 ár - og tann kostnaðurin sparir seg innaftur so ruddiliga, bara við inflatión og natúrligum hækkan av kostnaðum

yvir so nógv ár.

Og hví nevna 100 ár - jú, tí brúgvin um Streymin hevur júst runda 50 ár og er høvuðsumvæld, til at standa har tey næstu
50 árini fram í tíðina - so holini til Suðuroyar eiga at arbeiðast inn í so langan plan - sum man tekur eitt stats-lán frá
Danmark til - sum eitt ser-projekt øllum ríkinum at gagni !
Hugsað verður her um trygdina - t.d. um okkurt hendir í t.d. eini krígs-støðu - gerast Føroyar heilt úti á glat-is um okkurt
hendir við tí einsamalla - og smala - holinum, sum Løgtingið er í fer við at fremja.

So fremji tað strævnast, tvs. at hugsa langt fram í tíðina, og tryggja eftirkomarum okkara eina breiða og tíðarhóskandi farleið, sum svarar til øktan tørv framyvir við bilaferðslu - hugsið bara um at bilamongdin er tvífalda síðan ár 2000 - og at helvtin av vøkstrinum eru stórir lastbilar, treylara, bussar og onnur stór flutningsfør.
Tey verða ikki færri í framtíðini, nú vit eisini síggja ein vækstur í fólkatalinum alla tíðina - eiga her eisini at fyrireika seg uppá at skjótt koma enn fleiri fólk sunnan úr teimum heitu økjunum higar at búgva.

Fremur Løgtingið eina ordiliga loysn - og ikki núverandi leið 1a elle b - hvussu tað eitur, fara eftirkomarar okkara um eini 100 ár umrøða verandi løgmann og løgting við stoltleika.

Virðingarmest
Uffe Bærentsen
Leitisvegur 20
FO-350 Vestmanna

tlf. 22 63 20

LM-066/2025

**Dan Michael Knudsen**

**Fra:** Uffe Baerentsen <uffekb@gmail.com>
**Sendt:** fríggjadagur, 14. november 2025 14:09
**Til:** Journalin hjá LMS
**Emne:** Re: Hoyrings skriv viðv. Suðuroyartunlinum.

Gloymdi at skoyta uppí hoyringsskrivið:

At við at gera 3 hol suðuryvir - gera vit stuttar teinar, sum vit - føroyingar í dag duga at gera - heldur enn at
gera ein heilt langan, sum vit - tvs. føroyingar - ikki duga at gera.

vh
Uffe

On Fri, Nov 14, 2025 at 2:06 PM Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo> wrote:

> Váttað verður fyri móttøku av telduposti tygara.
>
> We hereby confirm for the receipt of your e-mail.